

## Føroyingar til Crazy Gang

Christian Høgni Jacobsen og Gunnar Nielsen fara í næstum á venjingaruppihald hjá Milton Keynes Dons. Hetta er felagið, sum fyrr æt Wimbledon, og sum í síni tíð varð kent sum »the Crazy Gang«. Hóast lítið, so var felagið í drúgt áramál partur av enskum toppfótbólti, og ivaleyst man FA-Cup sigurin móti Liverpool standa ovast á breddanum í minninum hjá áskoðaranum. Nú er talan tó um tilveru í fjóðri bestu ensku deildini, og spurningurin er so, hvørt teir báðir føroyingarnir kunnu vera við til at styrkja vónina um uppflyting í fremstu røð.

## Tveir dystir í Klaksvík

Bæði menn og kvinnur hjá Mjølni spæla dyst í meistaradeildini í kvøld. Klokkan 19.30 spæla kvinnuliðini hjá Mjølni og Drátti, og eftir hetta eru tað menninir, sum standa fyri tørni. Har verður dysturin millum Mjølnir og Nøvuna.

# HB skýlið eitur nú Kaupthing-skýlið

**Aktiv marknaðarføring er lyklaorðið hjá Kaupthing Bank, sum í gjár gjørdi fýra ára sponsor-sáttmála við HB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Soleiðis kemur HB-húsið at síggja út framyvir. Við greiðum frámerki til høvuðsstuðulin hjá Formula-liðnum hjá felagnum*

Íslandssáttmálin fær gildi í dag, og millum annað inniber tað, at Kaupthing nú fer í holt við at ítøkiliggera ætlanir sínar um at reka veruligt bankavirksemi í Føroyum.

Hetta inniber eisini, at felagið, sum higar til hevur verið virðisbrævameklarafelag nú skiftir navn til Kaupthing Bank – eitt navn, sum felagið veruliga vil marknaðarføra seg til.

Fyrsta stigið í so máta varð tikið í gjár, tá Kaupthing og HB skrivaðu undir sponsorsáttmála, sum er galdandi fyri næstu fýra árini.

– At vit nú víðka um virksemið, eins og navnið verður broytt, gevur okkum tørv á eini sterkari marknaðarføring. Tí partinum hava vit arbeitt við, og vit eru sera fegin um, at vit hava gjørt sáttmála við HB. Tí tað er uttan iva eitt tað allar besta lýsingarplássið, sum fæst í landinum, sigur Peter S. Holm, stjóri í Kaupthing.

Og Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur, var nú heldur ikki ónøgdur við avtaluna.

– Nú endaði árið hjá okkum jú heilt gott, men tað í sjálvum sær gevur ikki úrslit. Fyrireikingarnar til komandi árið eru langt síðani farnar ígongd, og hendan avtalan gevur okkum møguleikan at skapa eitt gott fíggjarligt grundarlag fyri rakstrinum, sigur hann.

### Aktiv marknaðarføring

Umframt at vera sjónligir á spælarabúnunum, verður Kaupthin eisini í aðrar mátar ein aktivur partur av vørumerkinum, sum eitur HB. Ein ætlan, sum eisini er heilt tilvitað.

– Vit hava hugsað um fleiri møguleikar at branda okkum saman við HB. Eitt nú verður Kaupthing merkið á øllum samskifti, sum fer úr HB-húsinum, eins og venjingarbúnar, sum nógvur ungdómur brúkar, eisini bera okkara merki.

– Men mest sjónligi parturin verður helst í samband við heimadystirnar hjá felagnum. Vit koma at brúka hesar til aktivt at gera vart við okkara leiklut, og so hava vit eisini valt, at HB-skýlið nú fær navn eftir okkum. Tað er nakað, sum ikki er roynt í Føroyum áður, og vit eru sera fegnir um, at leiðslan í HB vildi ganga hesum ynski á møti, sigur Peter S. Holm.




*Soleiðis sær nýggi HB-búnin út*

# Nýggjur málverji til NSÍ

**Sum skilst hevur Jens Martin Knudsen ongar ætlanir um at gevast, men tá venjingin byrjar aftur, hevur NSÍ eisini Predrag Markovic í hópinum, sum eisini telur brasilska Anderson í álopspartinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

NSÍ tykist veruliga hava brynjað seg út til komandi kappingarár. Her fyri stóð greitt, at Jónhard Fredriksberg og Nenad Stankovic koma til felagið av Skála, og longu tá varð boðað frá, at enn var ikki liðugt at styrkja um hópin. Í øllum førum skuldu bæði áleypari og verjuspælari koma afturat.

### Ein Stankovic afturat

Í gjár stóð greitt, at áleyparin verður Anderson, sum higar til hevur gjørt um seg hjá B68. Anderson hevur til tíðir víst seg sum ein tann vandamesta áleyparan í føroyskum fótbólti, og megnar hann at halda seg skaðafrían, verður hann uttan iva ein fongur hjá NSÍ.

Meira óvæntað er, at NSÍ nú eisini hevur gjørt sáttmála við útlendskan málverja. Hesin eitur Predrag Stankovic, og er beiggi at Nenad, sum ætlandi skal stýra NSÍ-miðvøllinum.

Okkum hevur ikki eydnast at fáa viðmerkingar frá Andreas Lamhauge, formanni í NSÍ, men sum skilst, so er ætlanin tó ikki, at hesin her og nú skal loysa Jens Martin Knudsen av í málinum. Veteranurin hjá NSÍ er kanska ikki longur partur av spælarahópinum á landsliðnum, men í Runavík er lítil ivi um, hvønn status hann hevur.

Ennrestar so verjuspælarin, sum felagið tosaði um, og so er spurningurin, hvat navn tá verður avdúkað.